# OYVINDUR FEK

**HVONN LIVE** Oyvind Brimnes, sum er farin frá sum stjóri á Landsverki, fekk eina húkakøku frá klaksvikingum leygarkvøldið. Jørn Astrup Hansen fegnaðist um at verða komin aftur til Føroya, men harmaðist orsøkina, og politiskir leiðarar vóru í krovinum á hvørjum øðrum

Eirikur Lindenskov

Leygarkvøldið sendi Rás2 fyri fyrstu ferð í heyst Hvonn Live. Hetta er stór live-sending, sum verður send beinleiðis av Hvonn í Havn.

Hesaferð var politiskt kjak á skránni. Jørgen Niclasen og Helena Dam á Neystabø, landsstýrisfólk, og Høgni Hoydal, andstøðupolitikari, kjakaðust um politisku og samfelagsligu støðuna.

Høgni Hoydal førdi fram, at Føroyar eru ikki í eini búskaparligari kreppu, men í eini politiskari kreppu, tí eingin leiðsla er í landinum. ABC-samgongan vil bara sita við valdið fyri einhvønn prís.

Jørgen Niclasen og Helena Dam á Neystabø vístu hesum aftur og søgdu, at ABC-samgongan arbeiðir miðvíst við teimum trupulleikum, sum eru í samfelagnum, og at nógv er fingið á skaftið seinastu tíðina.

## Harmaðist Eik-støðuna

Fleiri aktuellir gestir vóru eisini í Hvonn Live. Ein av teimum var kringvarpsmaðurin Suni Merkistein, sum júst hevur framleitt sjónvarpssendingar um føroysku poppsøguna. Hann greiddi frá, hvussu tað er at granska og grava í søguligum hendingum.

Jørn Astrup Hansen, sum er settur sum stjóri í Eik Banka, segði seg fegnast um at verða komin aftur til Føroya at arbeiða. Jørn Astrup Hansen var í nógv ár stjóri í Føroya Banka, men flutti fyri fimm árum síðani av landinum at búgva. Hann harmaðist tó orsøkina til, at hann nú var komin aftur hendanvegin at starvast. Hann helt fyri, at trupulleikarnir hjá Eik Banka vóru óneyðugir, men at nú má skil fáast á viðurskiftunum í bankanum. Hann segði, at hann hevði flogbillett til Danmarkar fyri jól, so steðgurin í Føroyum skal ikki verða langur í hesum skifti.

- Eg verði her, til annar stjóri er funnin, ella til bankin er seldur, segði Jørn Astrup Hansen.



**HÚKAKAKA**

*Politikarar heilsa upp á Oyvind Brimnes, sum fekk eina húkakaku frá klaksvíkingum*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

## Húkakaka

Oyvindur Brimnes, sum í farnu viku varð sagdur úr stjórastarvinum á Landsverki, greiddi frá, hvussu tað gekk fyri seg, tá ið hann varð sagdur upp. Hann tosaði eisini um, hvussu tey 10 árini, hann hevur verið stjóri fyri Landsverk, hava verið.

Eitt av málunum, sum Landsverk hevur havt við at gera, og sum hevur fingið nógv umrøðu, er húkurin í rundkoyringini í Klaksvík, sum Landsverk vil hava tiknan niður.

Klaksvíkingar eru tó ikki meira ósamdir við Oyvind Brinmen enn so, enn at teir høvdu sent honum eina heilsan, nú hann gevst á Landsverk. Oyvindur Brimnes fekk eina sokallaða húkakaku frá Sjómanndegnum. Hetta er ein kaka, sum Katrin Jacobsen hevur gjørt, og sum Norðlýsið hevur prentað uppskriftina til.

Ovyindur Brimnes takkað fyri heilsanina og kakuna úr Klaksvík.

eirikur@sosialurin.fo



*Oyvindur Brimnes við húkakakuni, sum Katrin Jacobsen í Klaksvík hevur gjørt*

